Eysturkommuna

# NEVNDARFUNDUR

## Býráðið

**Dagfesting:** 29.08.2024 kl. 17:00
**Málnr.:**

Nevndarlimir: Per Martin Gregersen
Katrin Kjartansdóttir
Magnus Skoralíð
Marjun Andreasardóttir
Rúni Justinussen
Marita Klein Joensen
Petur Súni Jacobsen
Hjalti Dalheim
Hanna Jensen

Varalimir:

Ikki møtt:

Nevndarskrivari: Ove Heinesen



| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Mál til viðgerðar** | | | |
| 39/24 | 24/00439-2 | Umsókn um keyp av parti av matr. nr. 36a SG | 3 |
| 40/24 | 24/00480-1 | Lýsandi jólatrø - Osmund Olsen. Frágreiðing og tilmæli | 5 |
| 41/24 | 24/00492-4 | Broyting av býarplani í Norðragøtu - Øki H broytt til øki E -við kirkjugarðin | 7 |
| 42/24 | 24/00493-2 | Broyting av býarplani í Syðrugøtu - Part av matr. nr. 44, 50, 40 og 37 | 8 |
| 43/24 | 24/00501-1 | Marknaumskipan av matr.nr. 189 og 36a í Syðrugøtu | 9 |
| 44/24 | 24/00513-1 | Tekningarrætt vegna Eysturkommunu - 24/00513 | 10 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 45/24 | 24/00171-5 | Skúlin við Gøtugjógv, matr.nr. 14 - fysikstova | 11 |
| | | | |

**Mál til viðgerðar**

## 39/24 Umsókn um keyp av parti av matr. nr. 36a SG

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 22.08.2024 | 25/24 | 24/00439-2 |
| 2 Fíggjarnevnd | 26.08.2024 | 32/24 | 24/00439-2 |
| 3 Býráðið | 29.08.2024 | 39/24 | 24/00439-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna hevur móttikið umsókn frá eigarunum av matr. nr. 154 í Syðrugøtu. Eigarin ynskir at keypa part av matr. nr. 36a svarandi til umleið 39 fermetrar. Eigarin av matr. nr. 154 hevur skift rottanga og leiðingar, og er hetta lagt inni á matr. nr. 36a hjá Eysturkommunu, og hevur ynski um, at keypa tann partin har rottangin liggur.<br><br>Matr. nr. 154 liggur í økinum B, Bústaðarendamál, og matr. nr. 36a liggur í øki A, Miðstaðarendamál.<br><br>Um loyvi skal gevast til hetta, er neyðugt at broyta byggisamtyktin og býarætlanin fyri øki.<br><br>Umsitingin mælir frá, at selja part av matr. nr. 36a í Syðrugøtu |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til, at taka undir tilmælinum hjá umsitingin. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 22. august 2024**
Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at selja part av matr. Nr. 36a til umsøkjaran.

**Fíggjarnevnd 26. august 2024**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.
Klik eller tryk her for at skrive tekst.

**Býráðið 29. august 2024**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá Byggi – og býarskipanarnevndini og Fíggjarnevndini

Eysturkommuna

# 40/24 Lýsandi jólatrø - Osmund Olsen. Frágreiðing og tilmæli

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 20.08.2024 | 54/24 | 24/00480-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 26.08.2024 | 31/24 | 24/00480-1 |
| 3 Býráðið | 29.08.2024 | 40/24 | 24/00480-1 |

**Málslýsing:**

Hugskot til jólapynt í Norðragøtu nov.-des. 2024

Osmund Olsen, ið hevur gjørt lampurnar, ið standa á gólvinum í býráðshúsinum, hevur í 2013 gjørt eina verkætlan við jólalist/jólapynti í Kolding, Danmark. Leinkja til mynd: https://www.osmundolsen.com/Danish/nikolaj%20DK.html

Spennandi kundi verið, um vit gjørdu okkurt líknandi í Norðragøtu, men við útgangsstøði í "okkara" jólatrøum, altso tær lampurnar, ið eru í býráðshúsinum.

Hugsanin er, at trøini skulu standa á einum grønum øki, har tey standa hampuliga tætt, antin í Norðragøtu ella við Gøtugjógv. Ljós verður í lampunum so tær lýsa í myrkrinum og tær standa úti frá uml. 15. november til 06. januar 2025.

Prísirnir uppá trøini, ið skulu tillagast til at standa úti í vindi og regni, er áleið:

1400mm = 11.200 kr pr stk
1200mm = 9.500 kr pr stk
1000mm = 8.600 Kr pr stk

Herafturat kemur fraktin uppá uml. 10.000 kr.
Um vit rokna við 10 trøum verður prísurin umleið: 96.500+10.000 = uml. 106.500 kr.

Arbeiðið skal í seinasta lagi byrja fyrst í september, tí tað tekur tíð at tillaga design, framleiða, samla og so hjá okkara arbeiðsmonnum at seta upp.

Hetta verður vakurt, øðrvísi jólapynt við list og listafólki úr okkara kommunu.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

Á fíggjarætlanini fyri 2024 eru 600.000 kr. settar av til rakstrarkonto 522, "Stuðul til mentan" (inkl. stuðul til ritlist). Herav eru d.d. 133.000 kr. tøkar.

Rakstrarjáttanin til jóla- og nýggjárshald er á 400.000 kr., men henda verkætlanin kann neyvan rúmast á hesi konto.

| **Tilmæli** |
| --- |
| |

**Mentanarnevndin 20. august 2024**
Mentanarnevndin mælir til, at verkætlanin verður framd og at hon, í tann mun tað ber til, verður fíggjað av rakstrarkontoini «jóla- og nýggjárshald». Her umframt heitir mentanarnevndin á fíggjarnevndina um at finna aðrar rakstrarkontur, har peningur kann vera tøkur til restfígging.

**Fíggjarnevnd 26. august 2024**
Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini, og at peningurin verður tikin av konto 6.11.32.511 (fríðkan av kommununi).

**Býráðið 29. august 2024**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini.

## 41/24 Broyting av býarplani í Norðragøtu - Øki H broytt til øki E -við kirkjugarðin

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 22.08.2024 | 26/24 | 24/00492-4 |
| 2 Býráðið | 29.08.2024 | 41/24 | 24/00492-4 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Samband við ætlanin at víðka kirkjugarðin í Norðragøtu er tørvur á at broyta part av matr. nr. 25a frá "H. Frílendi" til "E, almennir stovnar"<br><br>Markeraða øki kortskjal "Kirkjugarður í NG – Broyting í býarætlanina (eftir broyting)" vísir øki ið fevnir um broytingina.<br><br>Umsitingin mælir til at taka undir við hesari broytingini. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til, at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini. |

### Byggi - og býarskipanarnevnd 22. august 2024
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

### Býráðið 29. august 2024
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá Byggi – og býarskipanarnevndini.

## 42/24 Broyting av býarplani í Syðrugøtu - Part av matr. nr. 44, 50, 40 og 37

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 22.08.2024 | 27/24 | 24/00493-2 |
| 2 Býráðið | 29.08.2024 | 42/24 | 24/00493-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Ætlanin er um at broyta part av matr. nr. 44, 50, 40 og 37 í Syðrugøtu frá "H, Frílendi" til "B2, Bústaðarøki við serstakari byggisamtykt".<br><br>Markeraða øki á kortskjalinum "Byggisamtykt" vísir øki sum fevnir um matriklarnar 44,50,40 og 37, ið ætlanin er at broyta til B2, Bústaðarøki við serstakari byggisamtykt.<br><br>Umsitingin mælir til, at góðkenna uppskotið, um at broyta býarplanin fyri Eysturkommunu í Syrðugøtu smb. skjali í málinum. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingin. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 22. august 2024**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 29. august 2024**
Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá Byggi – og býarskipnarnevndini við 8 atkvøðum fyri og einari blankari.

Fyri: Per Martin Gregersen, Petur Súni Jacobsen, Marita Klein Joensen, Hanna Jensen, Rúni Justinussen, Magnus Skoralíð, Hjalti Dalheim og Katrin Kjartansdóttir.

Blankt: Marjun Andreassardóttir

## 43/24 Marknaumskipan av matr.nr. 189 og 36a í Syðrugøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 22.08.2024 | 29/24 | 24/00501-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 26.08.2024 | 34/24 | 24/00501-1 |
| 3 Býráðið | 29.08.2024 | 43/24 | 24/00501-1 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna hevur móttikið umsókn frá eigaranum av matr. Nr. 189 í Syðrugøtu, um at fáa umleið 8 fermetrar av matr. nr. 36a í Syðrugøtu, sum víst á korti. Garðurin er bygdur fyri nógvum árum síðan og partur av garðinum liggur á matr. nr. 36a.<br><br>Eysturkommuna hevur gjørt eina gøtu sum gongur inni á matr. nr. 189, ið er áleið 20 fermetrar.<br><br>Mælt verður til at taka 8 fermetrar av matr. nr. 36a og leggja hesar aftrat matr. nr. 189 í Syðrugøtu. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 22. august 2024**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Fíggjarnevnd 26. august 2024**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 29. august 2024**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá Byggi – og býarskipanarnevndini og Fíggjarnevndini

## 44/24 Tekningarrætt vegna Eysturkommunu - 24/00513

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðið | 29.08.2024 | 44/24 | 24/00513-1 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Sambært kommunustýrisskipanini hjá Eysturkommunu, so er tað borgarstjórin sum saman við einum persóni sum býráðið hevur samtykt, heimild at undirskrivað skjøl sum binda kommununa t.v.s hava tekningarrætt vegna kommununa. Higartil hevur tað verið borgarstjórin og kommunustjórin sum hava havt hesa heimild, men hetta er tó ióngantíð formelt samtykt í býráðnum.<br><br>Tinglýsingin krevur nú at hetta er formelt samtykt av býráðnum. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at borgarstjórin og kommunustjórin sum hava tekningarrætt vegna Eysturkommunu. |

**Býráðið 29. august 2024**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

## 45/24 Skúlin við Gøtugjógv, matr.nr. 14 - fysikstova

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 22.08.2024 | 28/24 | 24/00171-5 |
| 2 Fíggjarnevnd | 26.08.2024 | 33/24 | 24/00171-5 |
| 3 Býráðið | 29.08.2024 | 45/24 | 24/00171-5 |

**Málslýsing:**

Í skúlanum við Gøtugjógv hevur eingin náttúru og tøknu/fysikk stova verið í longri tíð.

Umsitingin hevur arbeitt við hesum og í 2023 vórðu útveggir, vindeygu skift og asbest pláturnar tiknar burtur.

Í samráð við skúlaleiðsluna, eru vit komin fram til, at tað skal gerast ein náttúru og tøknu stova, vit hava fingið ynskini frá skúlanum um innrætting stovuni og hvat skal verða inni í hesi stovu. Ætlanin er, at fáa ráðgeva at tekna og gera útbjóðingartilfar.

Mælt verður til, at gera útbjóðingartilfar, útbjóðing og seta arbeiði í gongd.

**Ískoyti – august 2024:**
Á fíggjarætlanin fyri 2024 hjá Eysturkommunu er avsett 800.000,- kr. til íløgu til fysikkstovu í Skúlanum við Gøtugjógv.

Endaliga tilboði er hægri enn avsettu peningurin og er uppá 1.262.095,15 kr. tvs. at tørvur er á eini eykajáttan uppá 470.000,- kr.

Til ber at taka gólvið úr tilboðnum fyri at minka um kostnaðin, sum so verður 1.166.023,90 kr. og tørvurin á eykajáttan verður 360.000,- kr. tað merkir, at tað kemur at síggjast munur á verandi og nýggja gólvinum.

Umsitingin mælir til, at eykajátta 470.000,- kr. og fáa gólvið skift.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmæli**

Mælt verður til, at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Mentanarnevndin 20. februar 2024**

Mentanarnevndin mælir staðiliga til, at arbeiðið verður gjørt skjótast tilber. Hetta má vera liðugt áðrenn skúlabyrjan 24/25. Tað er alneyðugt at lærari/-rar, sum undirvísa í náttúru/tøkni og/ella alis-/evnafrøði mynda tekningina og tilfarslista saman við ráðgevanum.

**Byggi - og býarskipanarnevnd 22. februar 2024**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá Mentanarnevndini.

**Fíggjarnevnd 26. februar 2024**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Byggi - og býarskipanarnevnd 22. august 2024**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Fíggjarnevnd 26. august 2024**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 29. august 2024**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá Fíggjarnevndini

fundurin lokin 18:30

Per Martin Gregersen

Katrin Kjartansdóttir

Magnus Skoralíð

Marjun Andreasardóttir

Rúni Justinussen

Marita Klein Joensen

Petur Súni Jacobsen

Hjalti Dalheim

Hanna Jensen